Til Megd

CP Føroyar hevur hervið hesar viðmerkingar til uppskot um komandi lógarbroytingar, ið kunnu koma at raka okkara limir og onnur við breki.

Vit átala at hoyringsfreistin er so stutt. Hetta eru evnir, ið hava alstóran týdning fyri fólk, ið eru tarnaðið á ymiskan hátt. Havið í huga, at ein orsøk er til, at hesar lógir eru settar í verk av fyrstan tíð. Og royndirnar hjá flest øllum fólki við breki í Føroyum er, at tað ikki á nakran hátt er lætt ella nøktandi at fáa ein gerandisdag at hanga saman við teimum avbjóðingum, ið man hevur fingið á sína lívsleið. Tí vilja vit heita á landsins myndugleikar um ikki at skerja meir og spara hjá fólki, ið frammanundan hava tað avbjóðandi vegnað brek hjá sær sjálvum ella avvarðandi.

Stutta freistin at koma við viðmerkingum ger, at tað er trupult at fáa stundir at gjøgnumganga tilfarið til hesar broytingar. Hesum eru okkara viðmerkingar tí merktar av, men vilja vit tó vísa á ymiskt, ið vit ikki meta vera nøktandi:

LM-025/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Heilivágsstigin verður broyttur)

CP Føroyar harmast um at egingjaldið til heilivág hækkar í so stóran mun, sum lýst er lógaruppskotinum. Nógvir av okkara limum brúka nógvan heilivág, og er hesin lívsneyðugur !

Eisini eru vit kunnaði um, at fleiri limir hava fingið boð frá lækna og serlækna at brúka heilivág, ið als einki tilskot er til. Tað er heldur ikki altíð lætt at fáa kommunulækna at søkja persónligt tilskot til ein ávísan heilivág, frá Tilskostsnevndini, serliga ikki har, sum nógvir skiftandi kommunulæknar eru.

Niðurstøðan er, at nógv fólk við Cerebralari Paresu hava stóra heilivágsnýtslu, sum frammanundan kostar nógv. Fleiri av okkara limum, eru eisini lágløgnar borgarar, ið frammanundan hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman.

Tí er tað sera hugstoytt at egingjaldð til heilivág fyri flestu kemur at vera 3.100 kr. áðrenn tilskot verður latið fult, og væl at merkja bert til heilivág har tilskot er ásett. Heilsumálaráðið má absolutt eisini hyggja eftir heilivági har onki tilskot er á yvirhøvur, og um tað er rímiligt?

LM-022/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (Stuðul til bil broyttur til stuðul til serligan útbúnað til bil)

Við at taka burtur møguleikan at søkja stuðul til bil, ið umfatar bæði akfar og serútbúnað, sker Almanna- og Mentamálaráðið, borgarar við rørslutarni, enn meira á hond og fót. Hóast tað er gleðiligt at til ber at søkja um stóran bil sum hjálpitól, so er tað so nógv, ið er trupult og skeivt við hesum lógaruppskotið:

- Stuðul til bil/umbygging/útbúnað verður umsitin av deildini Hjálpartól undir Almannaverkinum. Ein deild, sum hevur til uppgávu at stuðla undir við útbúnaði, soleiðis at fólk við tarni, kunnu virka sum best í teirra gerandisdegi. Við hesum nýggja uppskoti kemur tað øvuta at henda.

- Landsstýrisfólkið í Almannamálum gevur sum grundgeving fyri broyting í §26 í Almannalógini, at persón bilur er vorðin ein vanligur brúkslutur, og tí er stuðul til bil tikin burtur. Uppskotið er sett fram uttan at far verður givið um borgari hevur møguleika at ogna sær ein bil, ið útbúnaður kann setast inn í? Nógvir av limum CP- Føroyum eru lágløntir , og inntøku fastlæstir, so teir sum útgangsstøði ikki hava lætt við at fáa lán til at keypa ein bil fyri. Um tað ikki ber til – hvat eru so útlitini? At sita heima tí ikki ber til at brúka almennan flutning? Tað kann í ringasta føri koma at kosta samfelagnum, nógvar ferðir upphæddirnar sum stuðul til keyp av bili er.

- Í uppskotinum stendur at Akstovan skal meta um tørv. Er stovnurin førur fyri tí? So vítt sum CP-Føroyar veit so hevur Akstovan onga servitan ella serútgerð. Sum nú er eru metingartól og serbilar í Danmark, og tað er verri enn so altíð at Almannaverkið sendir nýggjar sjafførar at royna hesi tól í Danmark, áðrenn avgerð verður tikin hvussu bilurin skal innrættast og hvat slag av bili hóskar seg best til tørvin. Ongin bilsmiðja í Føroym umbyggir bilar, sum er.

LM-023/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Frávik um stuðulsveiting til lesandi í útbúgvingaraldri strikað

Í grundgevingini fyri uppskotinum er orðavalið rættiliga mótsigandi: “ Ung við serligum tørvi verða sostatt javnsett við lesandi, ið ikki hava serligan tørv.” Tað ber als ikki til – Serliga ikki tá tørvurin er viðføddur og lívslangur ! Hvussu familjur húsast, sum hava børn undir útbúgving, fer CP-Føroyar ikki at blandað seg upp í. Tó vita vit at tað kostar meira at bera brek, enn hjá øðrum. Eitt dømi:

Útreiðslur hjá heimabúgvandi miðnámsskúla næmingi yvir 18 ár orsakað av CP: fys 990 kr um mdr og ergo (606 kr hvørja *ferð-td x2 um mdr= 1.212 um mdr. tvs bara venjing= 2.202 kr um mdr. Og so gjald til avlamisbussin= 1000 um mdr. Harafturat olja ca 1000 kr um mdr. = 4.202 kr + lívið annars.*

Viðmerkjast kann at Cerebral Paresa er ikki partur av málbolkinum hjá deildunum Venjing og Samskiftismenning á Almannaverkinum, so fleiri av omanfyri nevndu útreiðslunum má viðkomandi rinda sjálvur.

Fleiri av okkara ungu og ungu vaksnu hava ikki orku til at hava lestrarstørv. Brekið kann hava ógvusliga møði við sær, og niðursettur fysiskur førleiki kann gera tað sera krevjandi td at gera skúlating. So í nógvum førum tekur lesturin alla orku, og onki er eftir til møguliga at forvinna sær eitt oyra afturat. Tað er eisini avmarkað hvørji arbeiðspláss eru nóg atkomulig fyri ein skúlaungdóm við CP, at útinna eitt lestrarstarv.

Viðmælast kann eisini at stuðulsskipan verður sett á stovn undir Studna, soleiðis at lesandi við CP, ið ikki eru undir arbeiðsbúgving, kunnu søkja sær eitt “brekískoyti” eins tað finnist í okkara grannalondum (Handicaptillæg) Har virkistarn og ikki sjúkustaðfesting er grundarlag fyri stuðli.

Vinarligast

CP Føroyar